

*Tað eru eini hús við Sundsvegin, sum trætan stendur um. Ognin er skógarfriðað, og tí kunnu húsini ikki um- ella útbyggjast fyri ikki at tala um nýbyggjast*
Mynd: Álvur Haraldsen

# Er á markinum til svik

**So hvassorðaður var ein sakførari um framferðina hjá einum starvsfelaga í sambandi við eitt húsakeyp, har hann ikki hevði upplýst, at grundstykkið er skógarfriðað og at húsini ikki mugu út- ella umbyggjast**

Leo Poulsen

Í 2007 keypti eitt ungt par tað, sum við fyrsta eygnabrá tóktist sum eitt dreymahús. Tað vil siga, at húsini sjálvi vóru einki at rópa hurrá fyri, men grundin var omanfyri 2.000 fermetrar.

Og sum sølulýsingin so lokkandi greiddi frá: Stórt grundøki við trøum og runnum og sólkrókum við einum rennandi løki gjøgnum stykkið.

Tað, sum sakførarin gloymdi at skriva í lýsingina var, at økið er friðað, og at Skógfriðingarnevndin til eina og hvørja tíð kann leggja grundina sum almenna plantagu.

Somuleiðis gloymdi hann at upplýsa keyparunum um, at ein um- og útbygging, fyri ikki at tosa um nýbygging, als ikki kundi koma upp á tal.

Nú fekk hetta ongar avleiðingar beinanvegin, tí unga parið, sum kom heim úr Skotlandi, skuldi fyrst finna seg til rættis. Men idyllurin vardi tó ikki leingi.

Skjótt varð staðfest bæði fýrur og rot í húsunum, og hetta varð gjørt vart við. Unga parið valdi tó at gera ábøtur á húsini fyri út móti einari millón.

Lagt oman á tær 3,7 milliónirnar, sum tey høvdu givið fyri ognina, er talan um nógvar pengar. Men tað skuldi vísa seg, at hetta bara var toppurin av ísfjallinum.

## Friðað

Útvarpið hevði í 2006 keypt eitt stykkið av grundøkinum frá táverandi eigarunum, og tí tí sambandi hevði Skógfriðingarnevndin ásett nakrar treytir, fyri at góðkenna keypið.

Uppruna eigarin hevði í 1977 sjálvboðin biðið um at fingið grundøkið skógarfriðað, og hetta varð gingið honum á møti. Trupulleikin var bert, at hetta førdi til, at ein servituttur varð tinglisin á grundøkinum, sum gav Skógfriðingarnevndini ræðisrættin á grundøkinum, samstundis sum húsini á grundøkinum vórðu friðað.

Tá Útvarpið so vildi keypa part av grundøkinum til eina ætlaða úgbygging setti Skógfriðingarnevndin ta treyt, at alt økið hjá Útvarpinum varð umfatað av skógarfriðingini.

Upprunaliga høvdu keypararnir fingið at vita, at grundøkið var skógarfriðað, men fingu samstundis at vita, at hetta bert merkti, at tey skuldi halda grundøkið innhegnað. Og tað hildu tey bæði rætt og rímiligt, eisini fyri egna skuld.

Men á einum fundi við Jógvan Jespersen, táverandi útvarpsstjóra, fingu tey rama sannleikan at vita. Grundøkið hevði nú almennan ræðisrætt, og tey kundi ongar um- ella útbyggingar gera.

Forfard fóru tey bæði beina leið oman til sakføraran, sum vissaði tey um, at eingin tinglýsing var framd, og at hetta skuldi hann nokk orðna.

Trupulleikin var bert – sambært sakføraranum hjá saksøkjarunum – at tinglýsingin var framd, og tað av nevnda sakførara sjálvum.

## Nevndin stóð við sítt

Sakførarin hjá seljarunum gjørdi nú eina roynd at loysa málið við at taka upp fund við Skógfriðingarnevndina, men hon var hvørki at høgga ella stinga í. Vildi ikki hoyra talan um at frámatrikulera grundøkið.

Nú vóru so góð ráð dýr.

Unga parið vendi sær so til býráðið. Tey høvdu ítøkiligar ætlanir um eini heilt nýggj arkitektteknað sethús, men hesi vóru áleið 200 fermetrar, og byggiumsóknin varð blankt avvíst.

So var einki annað at gera en at fara til sakførara við málinum. Ongar veruligar royndir vóru gjørdar at finna eina semju, og skjótt stóð greitt, at einasta góðtakiliga loysn fyri keypararnar, var at handilin gekk aftur.

Sum vera man vildu seljararnir ikki hetta sjálvboðið, og tískil er málið endað í rættinum.

Málið var so rúgvismikið, at tað ikki vóru stundir at avgreiða tað eftir einum degi, og tí varð tað upp aftur tikið í rættinum í gjár.

Trý vitnir vóru eftir at avhoyra, men tey varpaðu ikki avgerandi ljós á málið.

Sakførarin hjá keyparunum var ógvuliga hvassorðaður um framferðina hjá starvsfelaganum og segði, at tað var á markinum til svik, og undir øllum umstøðum vanheimild, ikki at upplýsa um servituttirnar, sum eru tinglýstir á ognini.

Verjin hjá teimum saksøktu gjørdi nógv burtur úr skógarfriðingarlógini og vísti á, at bert nevndin kundi gera plantaguna almenna, og at tað er hon ikki í løtuni.

Hann vísti eisini á, at keypararnir vistu um, at ognin er skógarfriðað, og at tað ikki kundi koma upp á tal, at handilin gekk aftur, og at tað í mesta lagi kundi gerast talan um avsláttur í keypsprísinum.

Dómarin mælti til semju og nevndi tvey dømi. Annað, har húsini verða seld av nýggjum, og seljarin so rindar munin millum sølupris og tað, sum keyparnir lótu fyri ognina.

Hin var, at saksøktu rindaðu keyparunum 600.000 krónur avtur, sum eru tveir triðingar av teirri upphædd, sum keyparin hevur umvælt húsini fyri.

Kunnu partarnir ikki semjast, verður málið tikið upp til dóms um nakrar vikur.